## Frá Google til Obama

Eric Schmidt, sum er stjóri í internetfyritøkuni Google, skal nú skifta starv og starvsøki, tí í framtíðini skal hann arbeiða sum ráðgevi hjá amerikanska forsetanum, Barrack Obama. Hvítu Húsini kunngjørdu í gjár, at Eric Schmidt er vorðin limur í einum serligum ráðgevatoymi, sum veitir forsetanum góð ráð innan vísindi og tøkni. Granskingarleiðarin hjá Google, Craig Mundle, er eisini í ráðgevatoyminum, sum telur umleið 20 fólk við stórari vitan innan vísindi og tøkni. Eric Schmidt var virkin í valstríðnum hjá Barrack Obama og virkaði eisini sum ráðgevi hansara tá.



## Brixtofte ikki viðhald

Tann serligi kærurætturin í Danmark hevur havnað einari áheitan frá fyrrverandi Farum-borgarstjóranum Peter Brixtofte, sum vildi hava eitt rættarmál ímóti sær at ganga umaftur. Talan er um eitt mál sum svik, og tað var tað málið, sum gav Brixtofte tvey ára fongsul. Síðani september hevur Brixtofte sitið í fongslinum í Horserød. Rætturin í Hillerød, Eystari Landsrættur og Hægstirættur vóru á einum máli um, at Peter Brixtofte skuldi hava tvey ára fongsul fyri svik, tí hann lat Farum kommunu rinda einum byggifelagi níggju milliónir krónur ov nógv, so felagið kundi lata ítróttarfeløgunum í Farum meirprísin sum stuðul.

**Grannarnir hjá Mimir hava fingið ov mikið av ófriði, ið stendst av gestunum hjá ølklubbanum. Síðan roykiforboðið kom, er støðan hjá grannunum vorðin óúthaldilig**



*Tað er stutt millum húsini í grannalagnum hjá Mimir í Varðagøtu í Havn. Seinasta árið hevur larmurin frá Mimir ikki verið til at hildið út, halda grannar hjá Mimir. Leiðarin í Mimir heldur, at trupulleikin hjá grannunum er ikki roykiforboðið, men tað at Mimir er har.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Grannar klaga um Mimir

ÓFRIÐUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Roykiforboðið, ið varð sett í verk 1. juli 2008, skuldi eftir ætlan gera umstøðurnar betri fyri tey, sum ikki roykja. Men í grannalagnum í Varðagøtu, Sjúrðargøtu og Tróndargøtu, hevur roykiforboðið verið einki annað enn ein sonn marra. Húsini í hesum øki standa so tætt upp at hvør øðrum, og órógvar tað grannarnar hjá Mimir, tá barrgestirnir fara út á trappuna at roykja.

- Tað órógvar ræðuliga illa. Gangur frá Mimir hevur altíð verið forferdiligur, men síðan roykiforboðið kom, hevur tað ikki verið til at halda út, sigur Mikkalina Norðberg, ið er nærmasti granni hjá Mimir.

Saman við øðrum savnaði hon undirskriftir inn til at klaga um ófriðin, ið kom úr Mimir.

- Í eitt heilt ár kundu vit slettis ikki liva her. Vit kundu ikki nýta okkara privatu urtagarðar, og alt árið í gjøgnum var eingin friður, tí mann varð órógvaður av øllum, sum gekk fyri seg á trappuni hjá Mimir, sigur hon.

### Ófriður um alt grannalagið

Tað hevur sostatt verið forferdiligt hjá Mikkalinu Norðberg og hinum grannunum hjá Mimir. Ikki einans er tað roykingin, sum órógvar, men í heila tikið alt virksemi, sum er knýtt at Mimir. Ein klaga er latin Mimir og løgregluni um ónøgdina hjá grannunum, har eitt tal av grannum hevur skrivað undir.

- Tað vísti seg, tá vit fóru at sendu klaguna, at tað vóru fleiri av okkara grannum, ið vóru firtin yvir at vit ikki høvdu verið hjá teimum eisini, tí tey vildu eisini klaga yvir larmin. So jú, ófriðurin hjá Mimir rakar ein stóran part av grannalagnum, sigur Mikkalina Norðberg.

## Ikki ein nýggjur trupulleiki

Tað kemur fyri hjá løgregluni, at fólk klaga um ófrið í samband við uttandura royking. Onkur skonkistøð koma í trupulleikar av nógvum larmi, sum oftast orsaka av akkustikki.

- Tað er so ymiskt við larmi uttan fyri skonkistøð. Onkra staðni hoyrist tað væl inn til grannan, og onkra staðni hoyrist tað betri longri burtur frá, verður sagt á løgreglustøðini.

Men jú, klagur koma fyri, og í tílíkum førum setir løgreglufólkið seg í samband við eigaran.

- Tað er kortini ikki ein nýggjur trupulleiki, at ófriður verður fráboðaður í miðbýnum í Havn. Skonkistøðini virða eina átalu frá okkum, og loysa so trupulleikan. Hvussu tey gera tað, blanda vit okkum ikki uppí. Tað skal bara vera innan fyri tað økið, tey hava loyvi at skonkja á. Um tey senda fólk út á gongubreytina, mugu tey um. Tey skulu bara ikki drekka úti á gongubreytini.

# Mimir fær skyldina fyri alt

**Nemus Napoleon Djurhuus, leiðari av Mimir, váttar at grannar hava klagað um ófrið síðan roykiforboðið kom. Men hann heldur, at tað er nakað annað, ið býr undir, tí Mimir fær snøgt sagt skyldina fyri alt ónt í grannalagnum**

ÓFRIÐUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í Mimir hevur leiðarin verið noyddur at senda fólkini út á gongubreytina at roykja, tí tað, at gestirnir standa úti á trappuni og roykja, órógvar eftir øllum at døma grannarnar ov mikið. Fyri at koma trupulleikanum til lívs, hevur Mimir søkt um at fáa eitt roykirúm inni, tí ein so stórur partur av gestunum roykja. Tann umsóknin liggur hjá Arbeiðseftirlitinum í løtuni.

- Vit larma. Fleiri onnur skonkistøð í býnum fáa loyvi at gera terassur, men vit fáa bara nei, tí vit larma ov illa. Alla aðra staðni kann mann eftir øllum at døma larma uttan hjá okkum, sigur Nemus Napoleon Djurhuus.

Hann sigur, at tað ikki er loyvt hjá gestunum hjá Mimir at standa á trappuni og roykja, men at teir í staðin verða bidnir um at fara út á gongubreytina at roykja.

- Vit vilja fegin hava eitt gott samband við okkara grannar. Tað hevur ikki verið ein trupulleiki fyrr, at vit larma, men tað er vorðið ein trupulleiki í síðstuni.

Hann kennir væl til klaguna, grannarnir hava sent.

- Vit kunnu halda skil á gestunum í Mimir, men vit kunnu ikki halda skil á øllum grannalagnum.

Nemus Napoleon Djurhuus leggur afturat, at trupulleikin hjá grannunum ikki bert snýr seg um uttandura roykingina, men at fólk kring Mimir hava ein trupulleika av skonkistaðnum.

- Tað vísir seg at Mimir fær skyldina fyri alt ónt her í grannalagnum.